

# Seks skip undir hamaran í morgun

Í morgun fóru allir seks partrolararnir hjá Jóhan Pálli Joensen undir hamaran. Føroya Banki hevði kravt søluna, og keyptu skipini sjálvir. Klokkan 9:45 byrjaðu tvingsilssølurnar av seks skipum hjá Jóhan Pálli Joensen. Skipini eru, Navarin, Borgarin, Smaragd, Safir, Fjalshamar og Nónhamar. Øll skipini vóru keypt av Føroya Banka fyri virði av sjópantukrøvunum. Tilsamans 2,95 milliónir krónur. Jóhan Páll Joensen sigur við Sosialin, at teir fara at samráðast við bankan um skipini, og vóna at kunna keypa tey aftur. Ein stórur partur av sjópantukrøvunum vóru frá manningunum á skipunum.



undan hevði eg í mesta lagi vænta mær 30 atkvøður.

Men sjálvur heldur hann, at hvalbingar kenna hann sum frammrættaðan, nýskapandi og semjusøkjandi og hann hevur verið upp í nógvum tiltøkum í sóknini.

Tveir bygdaráðslimir, Bjarta Berg og Levi Niclasen, sum hevur verið borgarstjóri í fleiri valskeið, stillaðu ikki uppaftur og tann eini bygdaráðslimurin, Magni Bertholdsen, rakk ikki innaftur hesuferð.

Sostatt eru tríggir nýggir bygdaráðslimir í Hvalbiar Kommunu og teir eru Herdis Jensen úr Sandvík, Rúni Thomsen og Niels Olaf Eyvindsson úr Hvalba og teir eru allir á lista A

Hinir bygdaráðslimirnir eru: Otto West, Niels Jacob Thomsen, øll á lista A og Trygvi Midjord og Martin í Nesi á Lista B.

*Niels Olaf Eyvindsson tók alt og øll á bóli í gjár tá ið hann bleiv fyrst valdur bygdaráðslimur í Hvalba og hann metir seg vera eitt evni til at verða borgarstjóri*

## Vil halda fram

Javnaðarflokkurin í Vági er longu farin at lodda dýpið fyri at skipa eina nýggja samgongu og fundur skuldi vera í dag við umboðið fyri uttanflokkalistan og møguliga eisini við umboðið fyri sambandsflokkin.

Hendir tað, er tað somuleiðis greitt, at samgongan, sum nú er í býráðnum, heldur fram.

Men tá ið vit tosaðu við hana í morgum, varð ongin avgerð tikin.

Kortini leggur hon dent á, at verður Javnaðarflokkurin við í eini komandi býráðssamgongu, er ongin ivi um, at hon skal halda fram sum borgarstjóri.

Tað einasta, sum kann forða Kirstin Strøm Bech í at verða borgarstjóri, er at Tjóðveldið, Sambandsflokkurin og Uttanflokkalistin, skipa samgongu við fimm av teimum níggju býráðslimunum.

Men í Vági verður tað mett nokk so sannlíkt samgongan, sum er, heldur fram

Kirstin Strøm Bech sigur, at størstu avbjóðingarnar hjá nývalda býráðnum í Vági verður at hava gott eftirlit við fíggjarstøðuni hjá kommununi.

- Men tað verður eisini ein avbjóðing at fáa gond á ellis-og røktarheimið og á ætlanina at gera barnagarð, sigur hon.

Somuleiðis liggur á láni at fáa kloakkviðurskiftini í rættlag, umframt at fáa ungdóminum betri umstøður.

- Men yvirkskipað verður tað ein avbjóðing at slóða fyri at fáa meiri virksemi í kommununa, sigur Kirstin Strøm Bech.

# Frá uppteljingini á Hálsi í Havn








